MATMENTAN



Arbeiðsbólkur kemur við loysnum

Sum eina beinleiðis avleiðing av óttanum fyri komandi matvørulógini, er ein arbeiðsbólkur settur, sum skal koma við uppskotum, hvussu stóra matmenningin, sum hevur verið seinnu árini, kann halda fram, tá undantøkini í matvørulógini ganga út í 2015

Rólant Waag Dam

Arbeiðsbólkur um matvørutrygd og matvinnumenning. Tað er navnið á bólkinum, sum landsstýrismaðurin við Vinnumálum, Johan Dahl, hevur sett at viðgera spurningar um matvøru-framleiðslu úr føroyskum neyta- og seyðakjøti.

Arbeiðsbólkurin er settur ásanandi, at tað er ein stúran í matstovuvinnnuni fyri avleiðingunum av matvørulóggávuni, tá verandi undantøk í lógini fella burtur í juni 2015. Tá skal føroyskt neyta- og seyðakjøt, sum er ætlað at selja í handlum og matvørum, verða úr løggildum hjallum.

- Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund 31. januar og fer at handa landsstýrismanninum sítt tilmæli í apríl, sigur Oyvindur av Skarði, formaður í arbeiðsbólkinum.

Hetta tilmælið skal koma við ítøkiligum loysnum, ið kunnu gera tað einfalt hjá framleiðarum at halda ásetingarnar í matvørulógini.

Matvinnumenning


Arbeiðsbólkurin hevur ikki fingið til uppgávu at gera uppskot til lógarbroytingar.

- Vit skulu heldur lýsa veruligu umstøðurnar og gera uppskot til, hvussu stóra matmenningin, sum hevur verið seinnu árini kann halda fram, eisini tá ið undantøkini í matvørulógini ganga út í 2015, og helst føra til størri og meiri fjáltáttaða vinnuliga framleiðslu, enn vit hava í dag, sigur Oyvindur av Skarði.

Hann upplýsir, at arbeiðsbólkurin ikki kom til nakra niðurstøðu eftir fyrsta fundin, men at fleiri fundir verða, áðrenn tilmælið verður handað Johan Dahl, landsstýrismanni, í apríl.

Fakta

Arbeiðsbólkur um matvørutrygd og matvinnumenning.
VINNUMÁLARÁÐIÐ: Oyvindur av Skarði, formaður
SLÁTURHÚSINI: Alberg Gaardlykke
HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN: Elspa Petersen og Óluva Niclasen
KOKKAYRKIÐ: Leif Sørensen
BÓNDAFELAGIÐ: Siggert Paturson
ÚTOYGGJAFELAGIÐ: Olga Biskupstø



HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn, hin 28. september 2011
Málnr.:-201100415-1
Útgáva1
Síða 1 av 1

Vegleiðing
Innrætting av hjalli at turka kjøt í

Endamál:
Turking av seyðakjøti, skera sundur, pakka til sølu til endabrúkara.

Alment:
Farast skal ikki undir turking ella ræsing av kjøti, um ov lýtt er í veðrinum.

Staðseting:
Hjallurin skal standa á slíkum stað, at dálking frá øðrum virksemi ella frá lendinum rundanum ikki verður borin at kjøtinum. Eisini má hann standa soleiðis fyri, at góður gjóstur fæst.

Hølir:
- Forrúm við hondvaski
- Turkirúm
- Pakkirúm
- Goymsla til pakkitilfar

Innrætting:
Innrætting av hjalli skal tryggja, at temperaturin í kjøtinum so vítt gjørligt fellur javnt niður um 7º C. Hitin í hjallinum skal skrásetast dagliga.
- Turkirúm skal vera við rimum á minst 2 síðum, so at luftskiftið er støðugt og ótarnað.
- Rúmið má vera so stórt, at krovini ikki nerta við hvørt annað, og ikki koma at útveggi.
- Hjallurin skal vera vardur ímóti skaðadjórum: vera rottu- og músatættur, hava flugunet fyri rimar
- flugulampu í forrúmi, og skipan fyri týning av rottu og mús.
- Forrúm skal vera, soleiðis at atgongd ikki er til turkirúm beinleiðis uttanífrá.
- Forrúm skal um neyðugt hava hóskandi pláss og útgerð at skera sundur og pakka við.

Útbúnaður:
- Handvask skal vera í forrúmi, við flógvum vatni og ikki handstýrdum krana. Flótandi sápa, pappírshandklæði og ruskílat skulu vera við hondvaskið.

Tilfar:
- Veggir, loft, gólv og útgerð til at hongja kjøt á skulu vera úr hørðum,sløttum tilfari, ið ikki drekkur vatn í seg, ikki gevur skaðilig evni frá sær, og sum er lætt at halda reint.
- Frárensl skal vera í gólvi í turkirúmi. Um gólvið er rimagólv, skal undirlendið vera asfalterað ella stoypt.
- Ruskrúm ella bingjustað skal kunna spulast.
- flugulampu í forrúmi, og skipan fyri týning av rottu og mús.
- Forrúm skal vera, soleiðis at atgongd ikki er til turkirúm beinleiðis uttanífrá.
- Forrúm skal um neyðugt hava hóskandi pláss og útgerð at skera sundur og pakka við.

Reingerð:
Áðrenn turkingin byrjar, skal hjallurin vaskast og sóttreinsast og vera turrur.

Persónligt reinføri:
- Arbeiðsfólk skulu hava hóskandi arbeiðsbúna, sum skal vera reinur.
- Atgongd skal vera til starvsfólkavesi, ið ikki er partur av privata húsarhaldinum í tíðarskeiðinum, hjallurin er í brúki.

Annað:
Meðan kjøt hongur í hjallinum, skal ongin onnur vøra vera inni.

Mint verður á, at hetta eru vegleiðandi krøv til innrætting.
Mett verður um høli sviðurskiftini og endalig avgerð verður tikin í hvørjum einstøkum føri.

Matvørulógin

Løgtingslóg nummar 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m.

Nógv umstrídda matvørulógin er ikki nýggj. Hon varð undirskrivað at Kaj Leo Holm Johannesen, løgmanni, tann 26. mai 2010 og kom í gyldið dagin eftir. Sostatt hevur hon havt virkna í skjótt fýra ár. Men eitt undantak hevur verið í lógini, sum fellur burtur næsta summar.

Talan er um Grein 60, stykki tvey, sum er soljóðandi:

»Framleiðsla, viðgerð, marknaðarføring og søla av føroyskum seyða- og neytakjøti til endabrúkaran umvegis heil- ella smásølu verður tó framvegis regulerað eftir galdandi siðvenju smbrt. løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m. til 1. juni 2015«.

Harvið verður á hasum økinum virkað eftir eini lóg, sum næstan 29 ára gomul – men tað verður broytt í juni næsta ár, tá skiftistíðin er av og hetta undantakið fellur burtur, og kravið um eitt nú løggildar hjallar verður veruleiki. So um tú skalt selja ræst ella turt til matstovur og handlar skal tað vera frá góðkendum hjalli (og sláturvirki).

Grein eitt í fyrsta kapitul í matvørulógini er annars soljóðandi:

»Endamál lógarinnar er at tryggja brúkarunum heilsugóðar matvørur við góðari góðsku, verja brúkararnar móti villleiðing, eitt nú ovurrós í sambandi við marknaðarføring av matvørum v.m., at fremja heilsugóðar matarvanar og soleiðis gera sítt til at tryggja matvørufamleiðarum og handilsfólkum ríkiligar og einsháttaðar treytir og at fremja føroyskan matvøruútflutning. Hetta skal stuðlast við einum virknum og tørvsvendum almennum eftirliti av øllum liðum í framleiðslu og umsetningi av matvørum«.